## VIÐMERKINGAR

# Farvæl fullveldi - farvæl ábyrgd



**Kjartan Hoydal**

Endamál og kós má til í føroyskum politikki, annars standa vit okkum ikki í alheimssamfelagnum. Hetta hevur mesta týdning fyri at gera Føroyar til eitt nútímans samfelag, har eitt vaksandi tal av føroyingum vilja arbeiða og virka.

Veruliga uppgávan hjá politikarum í Føroyum er at savna føroyingar um eitt felags endamál, eina felags kenslu av hvørja leið vit skulu halda fyri at fóta okkum í heiminum. Til hetta krevst ein dagsskrá við broytingum og úrslitum.

Flokkarnir, sum bjóða seg fram til valið 20. januar, tykjast vera samdir um at styrkja tær skipanir, sum eru týdningarmiklar fyri persónlig viðurskifti, sosialt trygdarnet, góðar tænastur til tey veiku í samfelagnum og góðar møguleikar at leita sær vitan og kunnleika. Neyvan er heldur stór ósemja um at vit skulu skapa so góðar karmar sum møguligt, so føroyskt vinnulív mennist og fjølbroytist. Yvirhøvur er semja um, at land okkara skal bindast saman við góðum samskiftis- og samferðslumøguleikum. Helst allir flokkar ynskja rættartrygd og at Føroyar eru eitt opið og nútíðar samfelag.

Um veruliga semja er um hetta, so setir hetta ávís krøv og aftur kemur kravið um eitt endamál, um at stinga út í kortið eina gongd, so veljarin veit hvar leiðin gongur. At politiska lívið ikki bert verður ein listi við lyftum,uttan kós, viðhvørt hendan vegin, viðhvørt handan vegin, viðhvørt niður, viðhvørt upp. Sum maðurin segði, um eingin kós verður sett, so er góður kjansur, at vit enda onkra heilt aðrastaðni, enn vit væntaðu.

Fullveldisleiðin, sum varð sett út í kortið í 1998, er besta dømi enn, í føroyskum politikki, um endamál og eina kós, sum røkka væl út um eitt valskeið. Undir hesi meginyvirskrift varð løgd ein ætlan, sum skuldi føra fram til, at føroyingar tóku ábyrgd av einum vaksandi tali av samfelagsøkjum, fram móti ein føroyskum stati við fullveldi í øllum spurningum.

Tað er greitt at hetta er ein krevjandi leið. Tað er lættari at leggja seg aftur á. Lat danir hava ábyrgdina av so nógvum sum gjørligt, lat teir halda áfram at fíggja partar av almennu fyrisitingini. Hví gera sær ómak og taka meira upp á seg?

Eg havi tað føstu hugsan, at vit eru noydd at taka ábyrgdina, um vit skulu skipa eitt vælvirkandi føroyskt samfelag, sum mennist og veksur og klárar seg í kappingini við grannalond okkara. Einki stendur í stað. Grannalond okkara mennast og flyta seg. Standa vit í stað, so gerast vit eftirbátar.

Fleiri veljarakanningar hava sýnt, at samsvar er ikki millum tað støðu, sum fólk hava til týdningarmiklar samfelagsspurningar og partapolitiska tilknýtið.

Dømi um hetta er støðan hjá veljaranum til yvirtøku av rættarskipan og ákæruvaldi og løgreglu. Bert 33%, halda at vit als ikki skulu yvirtaka rættarskipanina, og bert 43%, at vit als ikki skulu yvirtaka ákæruvald og løgreglu.

Hetta er kanska ikki so løgið. Hví skuldu donsk løgregla, danskt ákæruvald og rættarskipan verið tað besta fyri Føroyar? Hví skulu danskir ráðharrar og danskir fólkatingsmenn duga betur at skipa hesi viðurskifti í Føroyum enn føroyingar? Eru ákæruvaldið og løgreglan so dygdargóð, at tey ikki kunnu vera betur og til lægri kostnað? Halda vit at eftirlitið, við at lógir verða hildnar í Føroyum, vera fullkomið, so tað ikki kann batna? Sambært veljarakanningar heldur bert ein minniluti tað.

Vit vita av royndum, at føroyska umsiting og almennar tænastur eru alt ov kostnaðarmiklar, tí vit hava skrivað av danskar skipanir, sum eru ætlaðar einum samfelag 100 ferðir fólkaríkari enn okkara, og at vit ikki enn hava megnað at gera skipanir, sum gera nyttu burturúr, at vit eru eitt lítið samfelag.

Summi føra fram, at saman við Danmark standa vit sterkari í heiminum. Hetta er ein grundleggjandi misskiljing - tað er beint øvugt. Bert tá vit sjálvi leita, kanna, meta og finna fram til okkara egnu støðu til broytingarnar í heiminum vinna vit fram. Eru vit bert ein hali hjá Danmark, innan teir karmar, sum Danmark og ES semjast um, so er deyðin í durinum; vit sleppa ikki undan at taka ábyrgd.

Hugurin at taka ábyrgd viknar sum misálitið á politisku skipanini veksur. Tað er so ógvuliga lætt, at detta niður í "gamla" politikkin við persónsklandri og illgruna um at alt er politiskur rossahandil. Hvørja ferð tað fréttist um klandur og rossahandlar, undirbygdar ákærur vera reistar móti leiðandi politikarum og ikki afturvístar, so kvinkar álitið hjá veljarunum niðureftir og viljin at taka ábyrgd samsvarandi. Tað er tungt og drúgt at uppbyggja álit á politisku skipanina, men løtuverk at bróta niður. Eitt álop á fjølmiðlafrælsi dregur niður, eitt fiskiloyvi til ein politiskan felaga í óðum verki upp undir eitt val ger tað sama, valevni, sum fyrr hava kostað samfelagnum arbeiðspláss og 10 tals milliónir í almennum veðhaldum og eisini tá politikarar siga, ja vit eru fult fyri hasum, men ikki akkurát nú, vit mugu bíða til líkindini eru øðrvísi og betri.

Eitt krav um, at tey valevni, sum bjóða seg fram, eru fús at átaka sær vaksandi ábyrgd av og í øllum viðurskiftum og at finna føroyskir loysnir, sum hóska til føroysk viðurskifti, átti at vera grundleggjandi tónin í øllum valstríðnum. Tað krevur meira av tí einstaka politikaranum, men má vera meginkravið, um Føroyar skulu ganga framá í øllum lutum.

# Nakrar hugleiðingar í samband við valið 2004



**Jakobina Tórstún**

Í samband við valstríðið, kundi eg hugsað mær at byrja hesa grein við nøkrum brotum úr bókini "Frænir eitur ormurin", skrivað av Jens Paula Heinesen, og útkomin fyri 30 árum síðani, í 1973.

Í kapitlinum "Tvílyndið" lýsir Jens Pauli framburðskreftirnar og afturhaldskreftirnar soleiðis:

Bls.385. Endiliga í 1906 brast fyri nevi. Hesar báðar rørslurnar, ið ganga sum tveir sjónskir træðrir gjøgnum søguveftur okkara og sum finnast í allari politiskari søgu, komu fyri ein dag. Sambandsflokkurin og sjálvstýrisflokkurin føddust.Upp í tann fyrra flokkin tyrptist allir teir gráu menninir av ræðslu fyri tí nýggjaið koma skuldi.Upp í hin flokkin fóru hugsjónarmenninir at bjarga okkum burtur úr moralskri ómegd og armóð.

Hvat kunnu vit gera ? róptu fólk, vit orka einki, vit duga einki, vit eiga einki.Og teir svaraðu: Orka vit einki, so mugu vit styrkja okkum, duga vit einki, mugu vit læra okkum dugnaskap, eiga vit einki, mugu vit skapa okkum tað, ið tørvar. Hava vit ikki lendingar, vegir og brýr, so byggja vit tær. Hava vit ongan føroyskan skúla, so seta vit hann á stovn. Hava vit einki kirkjumál, so skapa vit okkum eitt. Hava vit ongar sangir at syngja, so yrkja vit teir. Hava vit ongar skúlabøkur, so skriva vit tær. Hava vit eingi yrkisfeløg, so seta vit tey á stovn. Og so framvegis, og so framvegis. Eitt var monnum fullkomiliga greitt: Einki úrslit kom burtur úr við at sita við hond í favn og bíða eftir, at aðrir gjørdu hetta fyri teir. Tí brettu teir upp um armar og fóru til verka . Teir offraðu seg, meðan "veruleikans menn" díktu teir undir í hánarorðum.Tey somu hánarorð, vit kenna alt ov væl frá okkara egnu tíð.Einki er nýtt undir sólini.Teir gráu menninir ganga aftur. Sum bjargamál úr søguni regna orð teirra niður yvir okkum í dag.

Ì dag siga veljarakanningar, at Sambandsflokkurin fær stóra framgongd.Um so verður, er tað stórt spell, og eitt afturstig fyri Føroya fólk.

Havi lurtað eftir valsendingunum og m.a. hoyrt Sambansflokkin . Eg má siga tað, at tómari tos skal man leita leingi eftir. Helgi Jacobsen í útvarpinum, spurdi um hvat fyri støðu Sambandsflokkurin hevðið til hetta og hatta.Teir høvdu onga greiða støðu til nakað sum helst, burtursæð frá at eldraøkið skuldi prioriterast, men hvussu tað skuldi gjaldast, ja tað høvdu teir heldur onki boð uppá. Og so var tað hasin hemmiligi skattareformurin hjá teimum. Álvaratos, spæla vit krógva og blunda? Eru vit ikki vaksin fólk.Hesin fantastiski skattareformur, sum skuldið gera tað, at fólk betur tímdi at arbeiða..Vit skuldu ikki gjalda meira enn 40% av síðst tjentu krónu. V.ø.o. tær høgu lønirnar, sum í dag gjalda nógvan skatt høvdu komi til at goldið minni skatt. Ein fullkomuliga sosialt órættvís skipan, sum passar beint niður í lumman á Fòlkaflokkinum. Guð náði okkum, um hasir báðir flokkarnir fara at hálsfevnast, so fáa vit borgarligan politikk fyri allar pengarnar. Hvat meinar Sambandsflokkurin í grundini við, tá ið hann vil hava okkum at arbeiða so nógv meira? Er tað ikki ivaleysa nokk, at foreldur við børnum arbeiða fulla tíð. Hvat skulu vit hava børn til, um vit ongantíð hava tíð til at verða saman við teimum? Eitt av teim málum sum fakfeløgini júst arbeiða fyri er jú niðursett arbeiðstíð, og at vit skulu kunna liva fyri okkara løn. Heilt erligt, um tað er onkur, sum so illani vil arbeiða allatíðina, kundi tað so ikki verið eitt hugskot, at hesi góvu onkrum, sum ongan arbeiðstíma eigur burturav frá sær - hvussu hevði tað verið. Vit kunnu ikki krevja gull og grønar skógir, og tað skal onki kosta okkum. At vit øll gjalda til eldraøkið og onnur økið yvir skattin er fínasta slag, og eisini tað mest rættvísa.Hetta er ein felags ábyrgd.Har má eg taka hattin av fyri Høgna Hoydal, sum í útvarpinum segði við Sambandsflokkin, at hann helt seg arbeiða ivaleysa nokk, og at hann ongan áhuga hevði í at gjalda minni í skatti enn hann gjørdi í dag.

At fólk ið seta búgv og sum ikki fáa endarnir at røkka saman, verða hjálpt á annan hátt enn við yvirarbeiði og hesum skattatosinum, er so nakað annað.Har haldi eg at tankin um t.d. íbúðartrygging (boligsikring), sum Jóanes Eidesgaard kom inná í Sjónvarpinum, er nakað ið arbeiðast kundi verið fyri.Vit eru eftirbátar, tá ið tað snýr seg um íbúðarpolitikk, og her eiga vit at gera okkurt munagott framyvir.

At endað aftur til útvarpssendingina við Sambandsflokkinum.Har var einki áræði at hóma nakrastaðni, so at siga alt kundi bíða, ongin støðutakan til nakað, jú vit skuldu verða stolt av, at vit høvdu tvey umboð á fólkatingi.Eg meini tað. Henda undirbrotligheit, sum ongantíð hevur bygt nakað land upp.

Vilja vit framgongd í Føroyum, vilja vit sosialt rættvísið, vilja vit menna okkum og okkara samfelag, so skulu vit ikki velja hesar borgarligu afturhaldskreftirnar.

Gøtuparlamentið raðfestir heilsu og sosialmál hægst, og tí er tað eftir mínum tykki upplagt, at Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum hava nakað tann sama sosialpolitikk í teirra valskrá, men eisini hava nógv annað til felags, koma at samstarva og stjórna hesum landi í komandi valskeiði.

Gott val.
Við tjóveldiskvøðu

W W W . S O S I A L U R I N . F O



# Absurdi sjónleikurin í politiska grulvigarðinum í Tinganesi

**Virgar T. Dalsgaard**



Í skjótt seks ár hava harra Arnfinnur Kallsberg og serliga harra Høgni Hoydal mishandlað okkara neyðars land við teirra stupida og infantila møsni um pseudoproblem, sosum danska kúging, fyri ikki at tosa um teirra monomanu og paranoidu *grammofonplátu* um fullveldið, sum hevur skullað burturleitt áhugan hjá veljarunum frá sociala gerandisdegnum, veruligum seriøsum politikki og landsstýrisins politiska hjálparloysi. Tað er jú klassiskt høvuðkamba-mynstur hjá evnasmáum politikarum at brúka chauvinismu sum kyniska flýggjan frá veruleikanum, altso sum eskapismu!

Henda parantesin í føroyskari søgu hevur verið ein sjáldsama óverdugur og skammiligur harmaleikur, har menn hava skift øll rationell argument út við innantómar klichéir og primitiv rakstrarróp, næstan sum við fólkaatkvøðuna í 1946. Menn hava ferðast sum viljaleysar rukkur til Reykjavíkar, Liechtensteinar, Michigans, Onglands etc. og fregnast um pseudospurningar, soleiðis at nógv hildu landspolitikararnar vera í ferð við at seta upp ein absurdan franskan sjónleik um tað totala meiningsloysi í tilveruni! Ì staðin fyri at ræsonnera um seriøsan politikk endurtóku landsgongumenn sum monotont messandi munkar sínar banalu flosklar um "*fullveldi*", "*evsta vald*", "*frælsar Føroyar*", "*danskan yvirgang*", "*sjálvberandi búskap*" og nú er allarseinasta klichéin frá republikanska urguni "*lokomotiv*" – tonkjararnir í tjóðveldisflokkinum sammeta seg nú í ramasta álvara við eitt lokomotiv – hetta man vera ein sprellimans-effekt, tí hetta er so naiv metafora, at hon kann bara vera producerað í London!

Men í einum landi, sum ikki hevur nakað jarnbreytastrekki, kundi tað akkurát líkst teimum eiðasøru tjóðveldismonnunum at farið og investerað í eitt risastórt lokomotiv, sum so kundi staðið í stað og grópað seg niður í rununa, tí eingin tjóðveldisheili hevði hugsað um, at eitt lokomotiv er púra óbrúkiligt, har eingin jarnbreyt er. Tjóðveldisflokkurin hevur ongantíð forstaðið, at tað er neyðugt at hava el-veiting, áðrenn man keypir sær eina kókiplátu!

Vit hava havt næstan sjey undanfarin feit ár, har landsstýrisgongurnar bara hava spælt sær í politiska grulvigarðinum við *fullveldi* og *grundlóg*, og nú koma tey sjey raku árini, har als *einki* er gjørt fyri at konsolidera seg og fyrireika seg til nógv verri tíðir! Fólk eru væl greið yvir, at nú er veitslan við at vera liðug og beiski gerandisdagurin meldar seg við hørðum krøvum.

### Tær innantómu Høgnesisku klichéirnar

Grammofonplátan við Hoydals-klichéum er nú so slitin og bótin í fullveldissúpanini er nú so sundurkókað, at soðið er sjálvt hjá fanatiskum tjóðveldisfusentastum ov tunt at fáa nakra mettu av! Fólk eru eisini troytt av rakstrarrópum og vilja nú heldur tosa um veruligan politikk, og hvussu samfelagið skal bjargast, nú likviditeturin er heilt í botni, og teir góðu konjunkturarnir eru av. Medicinmaðurin, sum tryggjaði Høgna eftir seinasta val úr eini politiskari offside støðu hevur verið Føroyum ein dýrur kleppur og næstan ført samfelagið eina øld aftur í tíðina!

Aldri áður í føroyskari søgu hava vit fíggjarliga havt slíkan undanvind, so hollar konjunkturar og so góðar møguleikar við astronomiskt høgum fiskaprísum, men *kortini* hevur tað eydnast hesum óhegniga og stak klombruta landsstýri at søpla burtur allar okkara søguligu tjansir, tí teir sum ábyrgdarleysir óvitar hava brúkt sína spinklu orku, men ómetaligan pening uppá propagandu í bókum, faldarum og enntá filmi um seg sjálvar og tað vitleysa fullveldisprojektið í staðin fyri at útbyggja eitt fjøllbroytt, fleksibult vínnulív, tryggja socialu vælferðina og viðlíkahalda vanrøktaðar bygningar, skip ella onnur forsømd framleiðsluamboð. Eisini hava landsins stjórnarmenn í hesum seks áraskeiði etið upp hálvaaðru milliard, sum vit fingu sum *beinleiðis forering* frá dønum í sambandi við sonevndu bankakreppuna.

Harumframt hevur tað eydnast hesum politiska grulvigarði at gera okkum internationalt fyri skommum og forpestað okkum álitisviðurskiftini við Danmark, sum javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin við seigum og systematiskum arbeiði høvdu fingið bygt uppaftur, síðani ta fatalu fólkaatkvøðuna í 1946, har viðurskiftini við Danmark vóru, um møguligt skitnari og meira betendað enn í dag!

Tað er bæði álvarsamt og syndarligt, tá ið ein politiskur óviti, ein amatørur uttan nakrar politiskar royndir og við sera lítlari vitan fær litið nógva makt upp í hendi og sleppur at mishandla eitt heilt samfelag. Høgni Hoydal og teir charlatanar, hann hevur havt afturat sær, hava verið ein verulig katastrofa fyri føroyska samfelagið!

Ein fantastur úr hesi kliku, harra Hermann Oskarsson vildi fyri stuttum lata alla føroyska vinnu fara fyri bakka, um henni tørvaði studning. Hetta er grovt ábyrgdarloysi og komisk ultraliberalisma frá fyrrverandi salonkommunisti, sum hevði Albaniu sum fyridømi í sínari tíð. Eitt føroyskt vinnulív heilt uttan subsidiir er heilaspuni og utopi. Uppskotið hjá Hermanni er rein teori og heilt uttan jørðforbindilsi – tað minnir um tann kirurgin, sum ger eina sera tekniskt eleganta og perfekta operatión, sum bert hevur tað brek, at sjúklingurin doyr! Hetta eru óvitarnir, sum eru ráðgevarar hjá Høgnaklikuni.

Tá ið Høgni Hoydal, eftir at hann var vorðin varaløgmaður, skuldi leggja fram sín politikk og sínar tankar fyri útisetum í 1999 í Keypmannahavn, kundi hann einki annað vísa á, enn at hann meinti, at føroyingar skuldu liva av IT-virksemi og computaraídnaði. Tá fóru fleiri av áhoyrarunum at flenna, og minni enn hálvtannað ár seinni lá allur IT-ídnaðurin nærmast í skeljasori, bæði í USA og í øllum norðurEuropa. Men hetta var bert lítið dømi um, hvussu totalt ábyrgdarleyst og óumhugsað alt projektið hjá hesum manni var. Hetta var dømi um, at maðurin eins og fantastarnir í Framafelagsskapinum í sjeytiárunum livdi í púra leysari luft í eini kuvøsu av sápubløðrum og næstan helt seg kunna fáa føroyingar at spáka á sjónum ella hála seg sjálvar upp við eygnabrýrnum.

### Hvussu mettu útisetar um fullveldið?

Eftir fundin í Føroyahúsinum var forvitnisligt at hoyra, hvat fólk longu tá hildu um fullveldisplátuna og klichéirnar, sum Høgni Hoydal júkaði uppaftur og uppaftur í saman.

*Ein suðuroyingur helt fyri, at hann helt Høgna vera samvitskuleysan "gamblara", og sjálvur helt sunnanmaðurin seg aldri hava verið meira ivaleysan í sambandsstevnuni enn júst hetta kvøldið.*
*Ein annar suðuroyingur: Hetta eru bara ynskir og trúgv – her eru eingi fakta og eingin vitan!*
*Ein vágamaður: Hetta var sum at hoyra um nýggju klæðir keisarans!*
*Ein havnarmaður helt fyri, at Hoydal virkaði sum ein skralltómur og bíligur demagogur.*
*Ein annar havnarmaður: Hetta er hættisligt spæl við vælferðini hjá vanligum fólki.*
*Ein kona úr Eysturoynn: Hetta er ein bíligur populistur.*
*Ein maður úr Sandoynni: Man hann sjálvur trúgva uppá tað, sum hann sigur?*
*Ein kona úr Vestmanna: Hetta er so órealistiskt, at tað virkar heilt religiøst!*
*Ein maður úr Klakksvík: Tað manglaði bara, at hann segði seg kunna ganga á vatninum.*

Tað kann nú sum fyrr sannast, at nationalisma er lívsfarlig – hon førir altíð til ábyrgdarloysi og fjalan av veruleikanum og hartil næstan altíð til fascismu. Nationalistar eru aldri førir fyri at loysa nøkur praktisk politisk mál.

Søgan vísir okkum eisini týðuliga, at tey allarstørstu framlop, sum verið hava í føroyskari politiskari søgu, altíð hava verið, meðan javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin hava sitið í landsstýri saman! Tì mugu vit vóna, at gamla gøtan, sum vit minnast, har teir báðir fyrrnevndu flokkar og gamli sjálvsstýrisflokkurin samarbeiddu, kemur at endurtaka seg, soleiðis at vit fáa teir tríggjar heimastýrisflokkarnar aftur til ræði.

Føroyska samfelagið hevur fingið nógvar mangulsjúkur undir hesum stýri, tí treingir landið til eina sanering við sterkum C-vitaminum!

# Amt ella loysing



**Thorbjørn Brochs**

Síðani eg flutti til Føroyar summarið 1984, hevur nógv verið tosað um samband ella loysing. Men tað var helst upp til hvørt løgtingsval, og aftaná skuldu heilt onnur mál avgera, hvussu eitt nýtt landsstýri skuldi setast samans.

So komið árið 1998. Men minnist til, at fyrst kom 1992, sum gjørdi tað møguligt at síggja, hvussu Føroyar eru eitt spælipláss, har danski handilsheimurin kann selja stórar íløguætlanir uppá kreditt, tó uttan at seta nakað í vága. Og grundin er, at Føroyar hvørki eru Føroyar ella Danmark. Ella – rættari sagt – Føroyar eru Føroyar, tá ið tað tænir donsk áhugamál, og Danmark – ella hvørki – tá ið tað tænir danska handilsheimsins áhugamálum.

Føroyar læna heimastýrið frá Danmark, men Danmark eigur tað, sama hvat løgtingsmenn sjálvir siga ella billa sær inn.

Nú siga fjølmiðlarnir, at føroyingurin heldur tað tekur ov langa tíð at greiða sjálvstýrisspurningin, og tí vil hann hava onnur mál á borðið, fyri at hvíla høvdið. Kanska passar tað, men so hevur Palliba Joensen ikki nýtt høvdið til at hugsa við. Sjálvstýrisspurningurin er tann mest avgerandi spurningurin at fáa svar uppá, og aftaná valið 1998 vildi meirilutin av føroyingum taka loysing yvir 15-20 ár. So ber ikki til at missa mótið aftaná fimm ár, uttan so at fólk veruliga vilja leggja seg undir Danmark. Helst er hetta støðan og tá er einasta nýtiliga loysnin at gerast eitt danskt amt við øllum teimum rættindum tað hevur við sær.

Í verandi støðu eiga vit ikki egnan avgerðarrætt, men mugu tó taka alla ábyrgd, sum Christiansborg áleggur okkum. Sum danskt amt høvdu vit átt ta trygd, at Danmark hevði ábyrgd av føroyska samfelagnum. Eg veit væl, at flestir føroyingar vísa eitt sovorðið uppskot frá sær, tí teir eru so vanir at hugsa um Føroyar sum eitt egið land við egnari mentan. Men mentanin er ikki í vanda. Poul Nyrup Rasmussen góðkendi føroyskt sum eitt danskt minnilutamál, og tað er galdandi frá fyrsta degi vit fara inn í tað nýggja tíðarskeiðið, eins og tað er galdandi í dag.

Sjálvur havi eg altíð ynskt, at føroyingar skuldu taka eina greiða støðu fyri loysing. Men nú tað er so sjónligt, at Palliba hevur mist mótið, er eingin grund er til framhaldandi at spæla við eldin. Hann ið heldur, at Christiansborg vil okkara besta, hann er blindur. Vit eru ein handilsvøra. Vit eru ein fyritøka. Christiansborg leggur ikki í at keypa okkum tann dagin einki virði er eftir í landinum.